# Jólahugni í kavaflykrum

**Í bítandi kuldanum hósdagin savnaðust nógv fólk til hugnaløtu uttan fyri Norðoya Sparikassa. Klaksvíkar Hornorkestur, gospelkórið Gleði, Brandur Enni og Kristel Lisberg stóðu fyri tónleikinum**

JÓL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Á øðrum sinni skipar Norðoya Sparikassi fyri hugnaløtu uttanfyri stovnin. Ein pallur er settur upp sunnaru megin bygningin, og har fara tónleikarar á pallin og framføra jólaløg hvønn hósdag í jólamánaðinum fram til jóla.

Ætlanin hjá sparikassanum við hesum tiltakinum er at taka aktivt lut í at skapa jólahýr í býnum. Og tað má sigast at eydnast teimum til fulnar.

Hósdagin vóru nógv fólk savnað við sparikassan, tá tiltakið byrjaði. Fyrst spældi Klaksvíkar Hornorkestur nøkur jólaløg, og síðani kom gospelkórið Gleði. Hetta er eitt nýtt kór, sum einans hevur eitt ár á baki. Tey framførdu tríggjar jólasangir, og tað ljóðaði avbera væl.

Síðani kom Brandur Enni og aftaná hann Kristel Lisberg.

Silvi var eisini og vitjaði eina løtu, og frøin var stór á børnunum.

## Pallur

Í fjør vórðu løturnar hildnar beint uttan fyri stovnin, men í ár hava tey sum sagt sett ein pall upp á parkeringsøkinum, sum er sunnan fyri bygningin. Hetta ger samstundis, at fólk betur kunnu savnast, tí plássið er nógv størri.

Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í Norðoya Sparikassa sigur, at tiltøkini lata til at koma betur til sín rætt á parkeringsøkinum.

Meðan tónleikurin streymaði frá pallinum, kundi fólk verma seg við einum heitum munni, sum starvsfólk í sparikassanum bjóðaðu. Hetta mundi koma væl við hjá teimum flestu, tí tað var sera kalt hendan dagin. Eisini fingu tey køkur afturvið, og børnini fingu sunkist.

Onkur helt tó fyri, at tað kundi valla blíva meiri jólaligt við føgrum jólatónum og tjúkkum kavaflykrum, sum dalaðu niður.

Hesar hugnaløtur eru av sonnum eitt gott og jólaligt íkast til býin. Og fólk taka væl undir við tiltakinum. Tað er gott at kunna steðga á eina løtu og fáa ein heitan munn og eitt sindur av jólatónum afturvið.

Avgjørt eitt gott og hugnaligt tiltak, sum ikki krevur tær heilt stóru fyrireikingarnar, men sum hevur nógv at siga fyri jólahýrin millum fólk.



*Jólatónar, jólakøkur og dalandi kavaflykrur. Sannur jólahýrur uttan fyri Norðoya Sparikassa seinasta hósdagin*









